# JARN OG METAL



Allir lutir, ið innihalda jarn skulu latast inn til jarnendurvinning.

## Hvat skal latast til endurvinningar?

- Rein blikk og dósir (t.d. frá húsarhaldum)
- Skrúvur, jarnspønir, motorlutir
- Takplátur, hegn og o.tíl.
- Súkklur
- Radiatorar, komfýrar o.s.fr.
- Tangar, lemmar, veirar, rør, o.tíl.
- Motorar (GG: Filtur skulu vera tikin úr og oljan tippað av).

## Hvar kann tað latast inn?

Privat: Á kommunalu endurvinningarplássini
Vinna og kommunur: Til IRF, eftir avtalu á tel. 414243

## Hvar fer tað?

IRF sendir jarn og metalir til endurvinningar uttanlands. Størsti parturin verður sendur til Danmarkar, og annars avskipa vit eisini til Hollands, Skotlands, Týsklands og Svøríkis.

Jarn og metalir verða send til endurvinningar og gjørd til nýggjar lutir.

At framleiða nýggjar lutir úr endurvunnum jarni og metalum gevur munandi minni $CO_2$-útlát enn at framleiða somu lutir úr nýggjum tilfeingi. Harafturat broytist dygdin á tilfeinginum ikki stórvegis, tá ið tað verður endurvunnið.


Motorar (uttan olju)


Kopar


Aluminium


Jarn


Rustfrítt stál